# Rættartrygdin hjá fólki, sum ikki kunnu tosa sína egnu søk

**TURIÐ JACOBSEN**
ergoterapeutur

Sum skilst, bíðja vit eftir, at ST sáttmálin um javnrættindi hjá fólki við breki verður staðfestur í Føroyum. Eg havi hoyrt nógv føgur orð í tí sambandinum. Tá nú øll tykjast at vera samd um, at fólk við breki skulu hava javnrættindi, hví ikki byrja við at hyggja at rættarstøðuni hjá teimum, sum almannaverkið varðar av? Í okkara almannaverki eru alt ov nógv dømi um væntandi rættindi hjá fólki við breki, sum ikki eru før fyri at tosa sína egnu søk, t.d. fólk við menningartarni, autismu, og gomul við nógv niðursettum førleika. Hvat meina vit við, tá vit tosa um, at fólk við breki skulu hava somu rættindi sum aðrir borgarir, hvør skal avgera, hvørji rættindi tey skulu hava og hvussu tryggja vit rættindini hjá teimum, sum ikki sjálvi kunnu tosa sína søk?

**Fólk, sum ikki kunnu svara fyri seg**
Eg eri systir ein við menningartarni og kærdi fyri hálvum øðrum ári síðan Nærverkið, sum varðar av fólki við menningarni, fyri ikki at tryggja, at hansara søk verður talað í einum álvarsligum máli. Nærverkið hevur áhaldandi afturvíst ikki bara mínari kæru og øllum mínum viðmerkingum, tey enntá afturvísa og ignorera viðmerkingarnar frá Javna, felagnum, sum umboðar fólk við menningartarni og okkum avvarðandi. Hvør avger, at hann er rætt umboðaður og skal tað vera eitt mál ímillum Nærverkið og Javna/avvarðandi?

Fólk við autismu og Aspergers syndromi verða koyrd úr egnum heimi orsakað av sparingum - ja, tað talar fyri seg!! Endamálið skal eitast at vera sparingar. Øll, sum hava bara eitt sindur av vitan um autismu og Aspergers syndrom og brúkararnar, sum "sparingin" raka í hesum førinum vita, at flytingin kann hava við sær, at tey verða verri fyri, so sparing verður tað neyvan, heldur tvørturímóti.

**Starvsfólkini**
Fólk við menningartarni eru púra prísgivin teimum, sum dagliga eru um tey. Tað er avgerðandi fyri teirra menning og trivnað, at starvsfólkini eru fakliga væl fyri, hava neyðugu menniskjaligu eginleikarnar, kenna teirra brek, persónligu eginleikar, lívssøgu v.m. Har beiggi mín býr, bleiv øll starvsfólkaorkan skift út samstundis, í sambandi við, at starvsfólkini kærdu leiðaran til Nærverkið. Nøkur av okkum avvarðandi royndu at koma á tal við Nærverkið fyri at fáa tey at forða fyri, at starvsfólkini fóru úr starvi samstundis. Nærverkið afturvísti bæði okkara áheitanum og viðmerkingunum frá Javna. Seinni staðfesti Umboðsmaðurin (LUM), at starvsfólkini høvdu følt seg kroyst at fara úr starvi.

Høvdu "okkara" menningartarnaðu kunnað tala fyri seg, høvdu tey heilt víst eisini ynskt, at starvsfólkini blivu verðandi. Júst í starvsfólkamálinum hevur Nærverkið fingið álvarsliga átalu frá LUM fyri handfaringina, síðan tað er einki hent. Eitt dømi um mangland rættartrygd hjá bæði brúkarum og starvsfólki.

Og nú alt snýr seg um sparingar - eg hevði viljað sæð roknistykkið yvir, hvussu nógv kærumálið hjá starvsfólkunum og "mítt" kærumál hava kostað Nærverkinum, starvsfólkunum, okkum avvarðandi, Pedagogfelagnum, LUM og almannaverkinum bæði fíggjarliga og menniskjaligt.

**Hjálpartól til búfólk á "sambýli" ella "bústovni"**
Eitt er, at fólk við breki mangan ikki hava somu rættindi sum fólk uttan brek. Nakað annað er, at mismunur eisini verður gjørdur millum fólk við breki, alt eftir, hvønn "status" tann við breki hevur í almennaverkinum.

"Statusurin" er m.a. tengdur at, um ein býr á "sambýli" ella á "bústovni". Búfólk á "sambýli", hava rætt til at fáa persónlig hjálpartól frá Hjálpartólamiðstøðini (HTM). Búfólk á "bústovnum" hava mangan meira umfatandi brek enn búfólk á "sambýlum" og hava tørv á ymiskum persónligum hjálpartólum fyri at kunna fáa eitt so gott lív sum gjørligt, hóðast brek. Hesi hava tó ikki rætt til persónlig hjálpartól frá HTM, tey skal bústovnurin keypa teimum. Fáir bústovnar hava fíggjarorku til hetta. Mangan mugu hesi búfólk tí sjálvi gjalda fyri hjálpartólini, verða hjálpartólini fyriuttan ella taka til takka við t.d. avløgdum koyristólum, sum ikki passa.

Tað er serliga avgerðandi fyri heildarstøðuna hjá fólki við umfatandi kropslig brekum at hava ein koyristól, sum passar til júst teirra tørv. Antin brekið er viðføtt ella ein hevur fingið tað seinni orsakað av elli ella sjúku, er mangan, at ein ikki sjálvur megnar at lýsa sína støðu og krevja sín rætt. Hvør tosar teirra søk?

Ert tú uttanlanda til uppvenjingar, kemur meira enn so fyri, at tú fært játtað hjálpartól frá HTM, sum útlendska uppvenjingarstaðið mælir til. Tá tú kemur aftur til Føroyar og møguliga heldur fram við uppvenjingini á føroyskum sjúkrahúsi og meting verður gjørd har um fleiri hjálpartól, hevur tú ikki rætt til at fáa tey frá HTM. Kanska tú ert heppin at sleppa av aftur landinum til uppvenjingar, tá fært tú aftur rætt til hjálpartólið. Skil tað hvør skilja vil ...

**Lógarverk ella hugburður?**
Jú, her eru nógvar andsagnir. Vit, sum í okkara arbeiði aftur og aftur síggja óhepnu avleiðingarnar fyri borgararnar, hava ilt við at góðtaka, at tín "status" sum borgari í almennu skipanini skal avgera, hvørja atgongd tú hevur til persónlig hjálpartól, sum kompensera fyri títt brek.

Er verðandi lógarverk orsøkin til hesar mismunir og um so er, avspeglar tað hugburðin hjá teimum, sum gera lógirnar? Og um ikki sjálvar lógirnar, men hugburðurin hjá teimum, sum umsita lógirnar, eru orsøkin til mismunin - skulu vit so framhaldandi góðtaka, at rættindini hjá borgarum, sum ikki kunnu tosa sína egnu søk, líka so nógv eru treytað av hugburðinum hjá skipanunum, sum varða av økinum, sum av lógarverkinum? Eg haldi ikki!

# Yvirlýsing frá Føroya pedagogfelag

Nevndin í Føroya pedagogfelag hevur á nevndarfundi í dag tann 19. februar 2009 viðgjørt sparingarnar á almannaøkinum

Føroya pedagogfelag átalar harðliga tær sparingar, sum nú veruliga hava fingið avleiðingar fyri alt ov nógvar borgarar í okkara landi.

Føroya pedagogfelag er skelkað av tí raðfesting, sum politiski myndugleikin hevur framt – og vil heita á Føroya Løgting um at taka ábyrgd fyri øllum borgarum í Føroyum – eisini teimum veiku í samfelagnum.

- Vit síggja hvussu sparingarnar fara at raka Familjudeildina á Føroya Barnaheimi
- Vit síggja hvussu sparingarnar fara at raka Trivnaðartænastuna. Fólk verða flutt úr teirra heimum ímóti teirra vilja.
- Vit síggja hvussu eldraøkið er sindrað
- Vit síggja hvussu sparingarnar hava rakt heilsu- og sjúkrahúsverkið
- Vit síggja hvussu sparingarnar hava rakt Fróðskaparsetrið
- Vit síggja hvussu sparingarnar hava rakt Fólkaskúlaøkið

Osfr.

Er hetta tað, sum borgarar í hesum landi ynskja?

Føroya pedagogfelag heitir á Føroya Løgting um ikki at lata sparingarnar ganga yvir kjarnuvirðini í samfelagnum. Vit kalla okkum eitt vælferðarsamfelag, men hetta er so ikki tað vit uppliva í løtuni.

**Nevndin í Føroya pedagogfelag**

Jarvin Feilberg Hansen, *formaður*
Sigga Óladóttir Joensen, *næstforkvinna*
Jórun Ennistíg, *Kassameistari*
Jógvan Philbrow, *skrivari*
Joan Heinesen, *nevndarlimur*

# Yvirlýsing

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar vil hervið veita sín fulla stuðul til Føroya Pedagogfelag í stríðnum, at tryggja rættindini hjá teimum veiku í samfelagnum.

Brúkarar av trivnaratænastuni eru í løtuni serliga við skerdan lut, og standa nakrir teirra til at missa teirra verandi heim og tryggu karmar.

Felagið hevur eisini einstakar limir innan hetta økið, og vilja vit heita á hesar, um at venda sær til felagið um teirra arbeiðsstað eisini verður rakt av hesum órímiligu sparingum.

Felagið mótmælir harðliga tær sparingar sum eru at finna á fíggarlógini og hava vit gjørt vart við hetta áður bæði í okkara fakblað og í bløðunum.

Tað hevur stóran týdning, at Nærverkið er ein vælvirkandi stovnur, tí hesin er so týðandi fyri eitt stórt kjarnuøki í samfelagnum. Vit vilja samstundis eftirlýsa eina visjónsætlan, sum mennir og styrkir starvsfólk í Nærverkinum.

**Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar**

# Endursending og endursending

Tá ið tú lurtar eftir útvarpinum, leggur tú merki til allar endursendingarnar. Ein sending, sum varir ein tíma, verður send klokkan 10, og hon verður send aftur aftan á døgurða - ein heilan tíma, men at senda ein morgunlestur aftur, sum varir 10 minuttir, ber ikki til. Tað er heilt ófatiligt, og tá ið vit hoyra, hvussu nógv fólk eru hørm um hetta, mátti borið til at broytt tað aftur.
**Vinaliga Kristin Poulsen**

# Spennandi og upplýsandi familjudagur fyri hjartabarns familjur

**Í morgin, leygardagin 21. februar hava foreldur og avvarðandi at hjartasjúkum børnum møguleika at hittast fyri at hoyra um viðføddar hjartasjúkur og skifta orð um, hvørjum føroyskar familjur við hjartabørnum hava tørv á**

Lars Søndergaard, serlækni á Ríkissjúkrahúsinum, fer at greiða frá viðføddum hjartasjúkum og svara spurningum frá foreldrunum. Eisini verður skipað fyri orðaskifti, har øll hava møguleika at til at siga frá, hvørjum hjartabørn og familjur teirra í Føroyum hava tørv á.

Endamálið við familjudegnum er at geva avvarðandi at hjartabørnum møguleika at hittast og seta orð á, hvat tey halda skal til, fyri at hjartabarnfamiljur kunnu kenna seg tryggar í Føroyum.

Miðað verður ímóti einum hugnaligum og upplýsandi degi, har børnini eisini hava møguleika at hitta onnur við viðføddum hjartafeili.

Meðan tey vaksnu lurta og tosa, verða børnini ansað og klovnurin Hannibal vitjar. Dagurin endar við tunnusláttri.

Hetta er fyrstu ferð, at hjartabarnsfamiljur verða savnaðar til tílíkt tiltak og fyrireikararnir vóna, at undirtøkan verður góð. Ætlanin er at skipa fyri regluligum tiltøkum av ymiskum slag.

Tiltakið, sum verður 21. februar kl. 10.00 – 16.00, verður hildið í Kommunuskúlanum í Kongagøtu í Havn. Stigtakari til tiltakið er »Hjartabarnið«, sum er nýstovnaður áhugabólkur hjá Hjartafelagnum. Hjartabarnið hevur til endamáls at arbeiða fyri føroyskum hjartabørnum og familjum teirra. Øll eru vælkomin.

Lesið meira um »Hjartabarnið« á www.hjartafelag.fo og melda til tiltakið á hjartabarnid@hjartafelag.fo

**Skráin fyri dagin er soljóðandi:**

**10.00** Morgunmatur
**10.30** Lars Søndergaard
**12.00** Døgurðasteðgur
**13.00** Orðaskifti um hjartabarnsfamiljur í Føroyum
**13.00** Hannibal vitjar børnini
**15.00** Børnini sláa tunnu
**16.00** Familjudagurin endar